LØGTINGIÐ

«Adressekartotek»

Umsitingin

25. august 2011
j. nr. 10-20110002[1]ar/ás
(at tilskila í svari)

Til allar skúlar við framhaldsdeild

**Ungdómsting 2012**

Formansskapur Løgtingsins hevur gjørt av at skipa fyri Ungdómstingi í februar 2012. Eg fegnist tí um at kunna bjóða næmingum í 8., 9. og 10. flokkunum kring landið at vera við í Ungdómstinginum. Ætlanin er at hava tingið tann 6. og 7. februar 2012.

Hesar dagarnar seta næmingarnir sjálvir dagsskránna í Løgtinginum, og hetta er ein frálíkur møguleiki hjá næmingunum at skifta orð um evni, sum tey halda eru týdningarmikil.

Endamálið við Ungdómstinginum er:

- at geva næmingunum størri innlit í fólkaræðið
- at læra næmingarnar at vera ein virknari part av fólkaræðinum
- at vísa næmingunum í praksis, hvussu avgerðarmannagongdir virka í einum fólkaræði
- at geva næmingunum innlit í, hvør leikluturin hjá Løgtinginum er, og hvat arbeiðið hjá Løgtinginum fevnir um

Eg fari at mæla lærarum og næmingum til at vera við í Ungdómstinginum, so tit fáa møguleika at uppliva, hvussu tit kunnu vera við til at varðveita og menna eitt virkið fólkaræði.

Hetta er fjórðu ferð, at ungdómsting verður hildið í Føroyum. Seinast luttøku seks skúlar við seks skúlaflokkum. Tey 32 ungdómstingfólkini viðgjørdu 10 lógaruppskot, sum snúðu seg um m.a. ferðslu, revsing, skúlaviðurskifti og fyribyrging.

Formansskapurin hevur sett sær sum mál at gera hetta afturvendandi tiltak so væleydnað, at tað framhaldandi kann vera liður í útbúgvingini av okkara ungdómi.

Hjálagt er ein vegleiðing um, hvussu flokkarnir kunnu luttaka í Ungdómstinginum, og ein vegleiðing um at gera lógaruppskot og uppskot til samtyktar.

Vinarliga

Hergeir Nielsen
løgtingsformaður

LOGTING.FO

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901